VIÐMERKINGAR

# Løgtingið tók hyggjaragjaldið innaftur

**Ein viðmerking til Jørgen Niclasen, Torbjørn Jacobsen og Jógvan á Lakjuni**

**Mikkjal Helmsdal**
*sjónvarpsstjóri*



Tá Løgtingið í mai mánað endaliga samtykti fíggjarlógina fyri í ár, avgjørdi tað at taka burtur játtan sjónvarpsins til tøkni, sum í 2003 var 3,5 milliónir krónur. Við hesi minking í játtan stovnsins tók Løgtingið innaftur 94% av tí hækkaða sjónvarpsgjaldinum, sum varð álagt hyggjarunum frá 1. januar 2003.

Sjónvarp Føroya vísti í seinastu ársfrágreiðing síni á, at um stovnurin fær 3,5 milliónir minni at arbeiða við frameftir, so fer hetta at merkja færri sendingar. Stovnurin heitti tí á Løgtingið um at seta játtanina til tøkni aftur á fíggjarlógina í 2005 fyri at sleppa undan einum niðurskurði í talinum av føroyskum sjónvarpstímum.

Hesum venda løgtingsmenninir Torbjørn Jacobsen og Jørgen Niclasen og landsstýrismaðurin Jógvan á Lakjuni á høvdið í viðmerkingum í Sosialinum og Útvarpi Føroya fríggjadagin tann 6. august. Allir tríggir snara fráboðan sjónvarpsins í ársfrágreiðingini tann vegin, at SvF hevur sagt seg kunna framleiða minni fyri meira pening. Og leggja samstundis leiðslu stovnsins undir ikki at megna at fáa nóg væl burtur úr tí peningi, ið sjónvarpið hevur at arbeiða við.

Men pástandurin er beinleiðis ósannur. Sjónvarp Føroya hevur ongantíð sagt seg kunna framleiða minni fyri meira pening. Bert víst á, at um Løgtingið tekur 3,5 milliónir frá stovninum, so má stovnurin minka virksemið tilsvarandi.

At snara fylgjunum av sínum egnu gerðum móti leiðslu sjónvarpsins er tí heldur enn ikki jánkasligt, serliga av Torbirni og Jørgeni, sum báðir hava atkvøtt fyri at avtaka játtan sjónvarpsins til tøkni og lata hyggjaran gjalda hesar útreiðslur um hyggjaragjaldið.

Men útsagnirnar hjá teimum trimum eru sjálvandi ikki tiknar úr leysum lofti. Bert er bland komið í hjá teimum. Ein almennur fjølmiðlastjóri hevur nevniliga verið frammi og sagt, at tað verða færri sendingar fyri fleiri pengar. Tá kunngjørt varð, at útvarpsgjaldið hækkar við 100 kr. í ár, segði útvarpsstjórin við fjølmiðlarnar, at hetta fór at merkja sparingar og møguliga uppsøgnir og færri sendingar. Tann sakliga grundgevingin fyri hesum var sjálvandi, at hækkingin var ov lítil í mun til øktu lønarútreiðslurnar hjá stovninum. Men hvat telja sakligar grundgevingar, tá ið almennir fjølmiðlar verða viðgjørdir politiskt?

# Grovt herverk

– Vikuskiftið hevur verið nakað buldrasligt, sigur vakthavandi á løgreglustøðini á Sandi.

– Eg vil kalla tað grovt herverk í Skopun náttina millum fríggjadagin og leygardagin. Hetta tók nógva tíð hjá løgregluni og var umfatandi, sigur vakthavandi.

Herverk varð framt á hús og ognir hjá kommununi fyri tað mesta. Tað var serliga í skúlanum, at herverk varð framt.

Tað almenna pisshúsið fekk harða viðferð, og pisshúsið í skúlanum fekk somu viðferð. Talan var um brot á hurðar og veggir.

– Hetta kemur at kosta einar 30-40.000 krónur, vildi eg mett, sigur vakthavandi.

Talan er um fimm unglingar, sum eru í andglettinum fyri herverkið. Unglingarnir eru tiknir, avhoyrdir og skuldsettir. Løgreglan kannar ikki málið longur.

**-hkm**






WWW.SMYRIL-LINE.COM

Á túrunum spæla m.a. »Spaðar 5«, »Tey av Kamarinum«, »Showmenn« og »Havkallar«

super AUGUST TILBOÐ

DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANLAND Í BLOKHUS & HIRTSHALS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.950,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANCENTER-SUMMARHÚS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.780,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 9.400,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.890,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Stefan Ujvari (NO) og Göran Berndsson (SE) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.980,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.



SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo







# Blað um Summar Festivalin

**Í Sosialinum mikudagin verður eitt serblað um Summar Festivalin 2004, har lesast kann um bólkarnar og tað, sum annars er á skránni**

SUMMAR FESTIVALUR

Blaðið verður 24 síður í litum, og í tí eru greinar, samrøður, skrá, upplýsingar og annað um Summar Festivalin, sum verður hildin í Klaksvík um vikuskiftið.

Á Summar Festivalinum í Klaksvík fara kend føroysk og útlendsk nøvn at spæla. Millum nøvnini eru Ken Hensley, Boney M, Kjell Samuelson, Frændur, Hanus G. Johansen, Gunnar Mikkelsen, Hjarnar og Guðrun Sólja Jacobsen. Eisini fara Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags at gera comeback.

**Nógv á skránni**

Konsertir verða í Atlantis, KÍ-høllini, á Vágsbøi og á Sparikassapallinum.

Hóskvøldið hevur Pætur við Keldu konsert í Atlantis. Fríggjakvøldið verður workshop við Ken Hensley í Atlantis og dansur og konsert í KÍ-høllini við millum annað Gunnari Mikkelsen.

Leygardagurin er stóri festivaldagurin við stórari uttandurakonsert. Norðoya Sparikassi bjóðar ókeypis morgunmat leygarmorgunin millum kl. 10.00 og 12.00.

Frá kl. 15.00 verður undirhald og tónleikur av teimum báðum pallunum í miðbýnum. Útikonsertin endar um midnáttarleitið, og aftaná verður dansur í KÍ-høllini.

Sunnukvøldið kl. 20.30 verður gopselkonsert.

Í blaðnum um Summar Festivalin, sum verður í Sosialinum mikudagin, ber til at lesa meira um bólkarnar og skránna.

# Løgmaður á ríkisfund

RÍKISFUNDUR
*Tíðindaskriv*



Jóannes Eidesgaard, løgmaður og frú Anita eru í dag farin til Grønlands á Ríkisfund. Sjálvur Ríkisfundurin verður í mikudagin kl. 12.30 í Itilleq, sum er føðibýurin hjá landsstýrisformanninum Hans Enoksen.

Tað er eingin føst fundarskrá til Ríkisfundin. Vanliga verður kunnað um búskaparligu støðuna. Harumframt ætlar løgmaður at umrøða flogvøllin, yvirtøkulógina, uttanríkispolitisku lógina og møguleikarnar at seta ein felags embætismannabólk at kanna ES-grundlógina og møgulig árin hennara á støðu.


Sosialurin
Sosialurin í

Prekvalifisering

El-arbeiði í Norðoyatunlinum

Áhugaðir arbeiðstakarar verða við hesum bodnir at vísa áhuga at vera við í avmarkaðari útbjóðing av el-arbeiði í Norðoyatunlinum.

Prekvalifikatiónstilfarið fæst við at venda sær til skrivstovu okkara á adressuni niðanfyri, ella við at senda teldupost til hl@tunnil.fo

Freistin at lata inn umbidnu upplýsingarnar er 16. september 2004.



SANSIR TEL 355355

NORÐOYATUNNILIN

Norðoyatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postsmoga 1010 · 110 Tórshavn
Tel 350200 · Faks 350201 · www.tunnil.fo